# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 0720.
# Tíðarskeið: 21/03-28/03 - 2007

---

**Fólk við frá Fiskirannsóknarstovuni:** Petur Steingrund, Regin Kristiansen og Marit Pedersen.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund, ið eisini var toktleiðari.

**Endamál:** Hetta var triði túrurin av yvirlitstrolingunum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldu vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa.

**Eyka uppgáva:** Prøvar av havtasku og gulllaksi vórðu tiknir til Lise Ofstad. Hitin í trolinum varð skrásettur við miniloggarum. Ongar hydrografistøðir vórðu tiknar og heldur ikki varð WP-2 glúpur nýttur.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinhamns lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini hóskvøldið 22/3 kl. 21. Fóru fyrst á Munkagrunnin og tóku tær seks støðirnar, sum vantaðu í frá seinnu yvirlitstroling á landgrunninum (túri 0716). Tær støðirnar fingu nummurini 07160046-51. Fóru síðan á Føroyabanka og tóku støðir bæði djúpt og grunt, men kláraðu ikki fimm djúpar støðir har suðuri (puntarnir 20, 33, 39, 42 og 51 í stratum 18). Vit tóku tilsamans 24 góðkendar fiskistøðir á Føroyabanka og seks á landgrunninum. Vit høvdu trupulleikar av korallum í punti 53 í stratum 17. Tað var sum heild sera lítið at fáa. Vit landaðu mikudagin 28/3 í Havn.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Tal av nytrum var eftir ætlan (umleið 400) fyri hýsu, men kundi ikki vera størri fyri tosk ella upsa, tí so lítið var at fáa.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 14. apríl. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 20. apríl.

**Fyribilsúrslit:** Tað var munandi minni at fáa av hýsu enn samsvarandi túr í fjør og nakað minni av toski. Hinvegin var meira av upsa. Av øðrum fiskasløgum var sera lítið at fáa av gulllaksi og svartkjafti meðan meira var at fáa av t.d. glýsufiski og kongafiski og eisini av mathøgguslokki (Loligo). Sí annars Talvu 1. Vit fingu ein stóran kalva, sum var 208 cm langur og var 23 ára gamal. Hann hevði etið ein stóran tosk, sum var 68 cm langur í klingruna. Fiskurin hendan túrin var sum heild væl fyri. Magakanningarnar vístu, at sera lítið var til av nebbasild. Vit fingu ongan merktan fisk. Sum nakað nýtt fingu vit streymsild (líkist sera nógv gulllaksi). Tær vórðu frystar og tiknar í land og kannaðar nærri. Teirra longd og vekt eru nakað minni enn fyri ófrystan fisk. Tað er væl hugsandi, at streymsild hevur verið at fingið onnur ár, men at hon er skrásett sum gulllaksur.

**Talva 1**. Veiða,og nytrur og magar tikin á túri 0720.

| Fiskaslag | Kg 2007 | Nytrur | Magar | Nytrur 0716 | Magar 0716 | Kg 2006 | Kg 2007 / Kg 2006 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HÝSA | 1487.435 | 407 | 69 | 3 | 3 | 2588.58 | 0.57 |
| TOSKUR | 1050.155 | 210 | 58 | 3 | 3 | 1226.85 | 0.86 |
| UPSI | 953.494 | 280 | 46 | 10 | 10 | 632.715 | 1.51 |
| HAVMÚS | 574.618 | | | | | 559.742 | 1.03 |
| LOLIGO | 353.751 | | | | | 177.372 | 1.99 |
| GLÝSUFISKUR | 152.527 | | | | | 24.644 | 6.19 |
| KALVI | 126.986 | 1 | 1 | | | 12.23 | 10.38 |
| LONGA | 90.848 | | | | | 61.27 | 1.48 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 76.550 | | | | | 41.062 | 1.86 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 53.110 | | | | | 15.1 | 3.52 |
| SKRAMBUL | 13.360 | | | | | 39.113 | 0.34 |
| BROSMA | 11.375 | | | | | 3.04 | 3.74 |
| TUNGA | 9.005 | | | | | 11.355 | 0.79 |
| HAVTASKA | 7.045 | 2 | | 3 | | 77.056 | 0.09 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 5.911 | | | | | 14.782 | 0.40 |
| SVARTKJAFTUR | 5.204 | | | 6 | | 351.316 | 0.01 |
| STREYMSILD | 4.635 | 25 | | | | 0 | |
| GULLAKSUR | 4.012 | 1 | | | | 436.221 | 0.01 |
| KNURRHANI | 3.106 | | | | | 16.752 | 0.19 |
| LÁLLA | 2.933 | | | | | 25.515 | 0.11 |
| SANDSPRØKA | 2.722 | | | | | 7.559 | 0.36 |
| OCTOPUS | 2.513 | | | | | 0 | |
| GLASKVOYSA | 0.405 | | | | | 2.377 | 0.17 |
| NEBBASILD | 0.276 | | | | | 0.086 | 3.21 |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 0.242 | | | | | 27.707 | 0.01 |
| ROSSAMAKRELUR | 0.214 | | | | | 0 | |
| JÁKUPSSKEL | 0.030 | | | | | 0 | |
| Tilsamans | 4992.462 | 926 | 174 | 25 | 16 | 6401.72 | 0.78 |

**Viðmerkingar:** Mátibrettið á imponator 1 má kannast, um tað vísir rætt. Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í Tur0712d.doc.

<u>Petur Steingrund</u>